## MIÐLARNIR OG EG

í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



VÆLKENDI SJÓNVARPSMAÐURIN **ZACHARIAS HAMMER** LURTAR EFTIR KENNY ROGERS OG LESUR VIÐHVØRT SE&HØR.

**MÍTT BLAÐ**
Eg lesi tey føroysku bløðini. Onkutíð eri eg á bókasavninum og lesi Politiken og Berlingske.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg eri á Portalinum fleiri ferðir dagliga. Heimasíður um myndalist vitji eg eisini.




**MÍN TÓNLEIKUR**
Eg lurti eftir tónleiki, meðan eg koyri bil. Country og gospel dámar mær væl. Kenny Rogers er ein favorittur. Tá eg taki tað róligt heima, lurti eg eftir filmstónleiki, sum eg so eisini brúki til mínar egnu sendingar.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Eg eri við á Facebook, og havi fingi samband við nógvar vinir, sum eg ikki havi sæð í áravís.

**MÍN DVD**
Náttúrufilmar og dokumentarsendingar. Science fiction sigur mær onki. Eg fari onkuntíð út at leiga mær ein góðan spælifilm.

**MÍTT MAGASIN**
Konan heldur blaðið Kvinna, so tað lesi eg. Eg hyggi onkutíð í slatriblaðið Se&Hør eisini. Annars eru tað teknisk bløð um teldutøkni, sum eg lesi.




**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Eg royni at fylgja summum sjónvarpsrøðum, men oftani fara partar niðurfyri hjá mær. Tær donsku røðirnar Forbrydelsen og Krøniken dámdu mær sera væl.

**MÍN BÓK**
Eg las meiri fyrr. Men eg royni at lesa alt føroyskt, sum kemur út. Best dámar mær ferðafrásøgnir og biografiir.

**MÍTT ÚTVARP**
Eg lurti eftir Kringvarpinum og Rás2 og Lindini, tá eg eri í Havn. Eg búgvi í Nordepli, og har hoyrist ikki so væl. Eg plagi at vera inni á netinum og lurta.

**MÍN TELEFON**
Eg havi eina bíliga, vanliga Nokia. Eg kenni meg skerdan um eg ikki havi hana uppi á mær.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
Lættisoppa tilfar, ið onki sigur mær. Tá sløkki eg.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Tilfar, sum fer í miðlarnar, men sum ikki er egna at senda út.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Siðsøguligt tilfar. Hvørt einasta fólk hevur sína søgu. Sum nú er, fara nógvar av hesum søgunum fyri skeyti.

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Tórnroos

## 10 TING UM Lionel Messi

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



# Viðgerð sendi hann til Barcelona

HANN ER BESTI **FÓTBÓLTSSPÆLARI** Í SÍNUM ÆTTARLIÐI OG EIN AV BESTU SPÆLARUNUM, FÓTBÓLTSHEIMURIN NAKRANTÍÐ HEVUR SÆÐ

**1** Messi varð føddur í býnum Rosario í Argentina. Papi hansara arbeiddi á einari verksmiðju, og mamman arbeiddi onkuntíð sum reingerðarfólk.

**2** Familjan á pápasíðuni hjá Messi er úr Italia. Í 1883 flutti Angelo Messi úr italska býnum Ancona til Argentina at búgva, og tað er frá honum, at Messi er ættaður.

**3** Messi byrjaði tíðliga at spæla fótbólt. Longu sum fimm ára gamal spældi hann í einum lokalum felagi, har pápi hansara var venjari. Í 1995 flutti Messi til Newell's Old Boys at spæla.

**4** Tá ið Messi var 11 ára gamal fekk hann staðfest eina vakstrarsjúku, sum kravdi kostnaðarmikla viðegrð. Feløgini í Argentina vildu ikki gjalda fyri hesa viðgerð, men tað bjóðaði spanska felagið Barcelona seg til at gera, og tí flutti familjan til Spania at búgva.

**5** Messi spældi longu sum 16 ára gamal á besta liðnum hjá Barcelona í óalmennum dysti, og tá ið hann var fyltur 17 spældi hann fyrstu ferð landskappingardyst fyri felagið.

**7** Messi var yngsti spælari í La Liga nakrantíð og yngsti málskjútti nakrantíð, men bæði hesi met hevur liðfelagin Bojan Krkic síðani tikið.

**8** Í ár var Messi ein óvanliga tryggur vinnari av heitinum sum besti fótbóltsspælari í Europa. Messi var langt frammanfyri Cristiano Ronaldo í atkvøðugreiðsluni hjá France Football.

**6** - Hendan heiðurin gevi eg familjuni hjá mær. Tey hava altíð verið har, tá eg havi havt brúk fyri teimum, og tey hava stundum verið meira kensluliga ávirkað enn eg av øllum, segði Messi, tá ið hann fekk heiður sum besti spælari í Europa 2009.

**9** Tað sigst, at Messi hevur eina unnustu heima í Rosario í Argentina. Tað hevur hann sjálvur viðurkent í práti við sjónvarpsstøð. Tey skulu giftast seint næsta ár, verður sagt.

**10** Eftir at hava vunnið spanskar og europeiskar fótbóltskappingar, og eftir at hava vunnið HM fyri feløg sigur Messi, at nú stendur heimsmeistarheitið næst í røðini.

## SITAT



Tey siga altíð, at tíðin broytir tingini, men í grundini eru tað vit, sum skulu broyta tey.

***Andy Warhol***
*listamaður*